# Á ferð undir I



Settorva í øllum sínum veldi. Inn í líðina er bygt eitt hús, har viðingar húsast, tá teir eru í Settorvu og fleyga



Tað var við gleðiligum ovfarni, at ein kundi eygleiða stóra lomvigalandið í rókunum við Enniberg



Siglt varð inn í hellir og út gjøgnum smøl klippuhol

**North Adventures førir traditiónina víðari við útferðum undir Enniberg, men hevur eisini útbygt skránna soleiðis, at hon umframt hetta og fiskitúrar eisini umfatar torvskering í Svínoy**



FERÐAMÁL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Hóast veðrið er av tí allarbesta, runar illa við atløgukantin í Eiðsvík. Alpha Pilot liggur har klárur at taka ímóti okkum innbodnu gestum hendan túrin undir Enniberg, og tey møta so peu an peu.

Klokkan er farin tíggju minuttir út um avtgalaðu tíðina klokkan tíggju, tá spakuliga verður lagt frá landi. Ein bilur kemur undan sýnuni, og so er at venda inn aftur eftir seinum umboðum frá miðli og ferðaskrivstovu. Síðani verður stevnt undir Enniberg.

Tú merkir beinanvegin stórslignu náttúruna. Bergið innan fyri bara hækkar, og tá tú so kemur undir sjálvt Enniberg, er tað ein ørandi sjón. Hald í nakkan hevur tú ikki stundir at hugsa um, meðan tú hyggur beint upp í loft og undrast á, at føroyska náttúran kann bergtaka ein føroying so.

Við Alpha Pilot hendan dagin eru eini 25 fólk, og prátið gongur dúliga. Ikki øll hava við miðlar ella ferðavinnu at gera, onkur er bara boðin við fyri túrin skuld. Sum til dømis Jógvan við Keldu, fyrrverandi landsstýrismaður, løgtingslimur og borgarstjóri í Klaksvík. Ein annar er Heri Ellingsgaard, sjúkrahússtjóri á Klaksvíkar sjúkrahús. Eisini er Petur Andreassen við, ein gamal fótbóltskenningur.

Siglt verður ógvuliga spakuliga og lagt verður stilt við hvørt, so fólk veruliga kunnu njóta hetta hugtakandi útsýnið.

Við er eisini ein italiensk kvinna, sum júst er komin á vitjan í Føroyum. Hetta er ikki ein túrur fyri ferðafólk sum so, men Sámal Bláhamar og konan eru við, og hann hevur tikið sær loyvi at bjóða Francesku – sum hon eitur – við. Eisini hon er bergtikin.

## Væl av lomviga

Fyrstu ferð eg eri undir Ennibergi havi eg eisini ta frægd at síggja upp í Settorvu fyri fyrstu ferð. Á ongan hátt soleiðis, eg hevði ímyndað mær hana. Hon er mest sum ein drangur, sum bara er fastur í landi, og kundi fyri tann skuld verið eitt fitilendi fyri ein veðr ella báðar tveir.

Vit síggja eisini lítla húsið, sum er bygt inn í skráningin, men við onkum kikara ber ikki til at siga, hvar sessirnir eru. Ella kanska teir gera sum í Mykinesi og bara seta seg onkunstaðni í líðini.

Vit sigla tætt inn undir Settorvu, og á einari lítlari rók í berginum síggja vit eitt tíggjutal av lomviga sita. Hetta er sera forkunnugt, tí lomvigi eigur als ikki í Nólsoy.

Inni undir Settorvu er eitt hol, men tað ber kortini ikki til at sigla ígjøgnum tað. Har liggur nakað av malagróti, sum ikki slepst tvørtur um.

Vit sigla so víðari og koma til Drangin. Soleiðis eitur hann. Og har eigur í túsundavís av lomviga. Sjálvur haldi eg, at tað stendur bara væl til við lomviga, tá so nóg eigur her í bjørgunum, men Klæmint, skiparin, sum sjálvur er skúvoyingur, sigur,